tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Marknaðadeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Juni – ein hendingaríkur mánaður

## *Oddagrein*

Tíðin, sum vit nú ganga á møti, verður vanliga millum fjølmiðlafólk kallað agurkutíð, tí tá gera fólk seg so smátt út til at fara í feriu, tá lata ymsir stovnar aftur ella minka um sítt virksemi, eitt nú leggur løgtingið niður sítt arbeiði, ja tað er tann tíðin, tá steðgað verður eitt sindur á og nógv virksemi líkasum fer í dvala. Men taka vit hendingarnar í farna mánað, og tær sum standa fyri framman, so er nógv, sum bendir á, at tað verður eingin agurkutíð á hesum sinni. Í hvussu er verður hon nakað útskotin.

Stóru málini hesar seinastu dagarnar hava verið trupulleikarnir í kirkjuni, stríðið um postverkið og so tann óhugnaliga skjótihendingin í Klaksvík, alt mál, vit fara at hoyra nógv meira til komandi dagarnar. Men haraftrat standa nógv onnur stór mál á skránni, eitt nú 1000 ára haldið fyri krsitniboðanina í Føroyum og harvið eisini drotningavitjanin, eitt mál, sum fer at fáa stóra umrøðu í miðlunum.

Eitt annað stórmál eru samráðingarnar við donsku stjórnina. Her er talan um enn eitt umfar í samráðingunum, og sum skilst eisini eitt sera avgerandi umfar, nú báðir partar hava sett fram krøv og ynski síni. Grein 19 nevndin hjá løgtinginum er júst liðug við sítt arbeiði, og hetta er eisini eitt stórt og álvarsligt mál. Tingið verður so innkallað fyrsta dagin at umrða eykajátttan til postverkið. Tá hugsað verður um, hvussu ósamdir landsstýrisflokkarnir hava verið í hesum máli, so má roknast við lívligum orðaskifti.

Enn eitt politiskt mál er »Signar á Brúnni kanningin«. Tjóðveldisflokkurin hevur kravt, at hetta málið verður kannað, men tað er greitt, at nú spurningurin um fullveldi og samráðingar við danir er so aktuelt, og formaður Tjóðveldisfloksins er so nær tengdur við hetta mál, so neyvan er væntandi, at hann heldur fram at røkja starvið sum landsstýrismaður í menta- og útbútgvingarmálum. Tað hevur ljóðað, at onkur verður settur í heita sessin hjá Signar á Brúnni fyri at avlasta formannin, sum sjálvandi er illa sperdur at skula umsita ein tann heitasta sessis samstundis sum hann skal taka sær av samráðingunum við danir. Og neyvan er hugsandi, at formaður Tjóðveldisfloksins er fegin um at skula sita í hesum heita sessinum, nú tá útlit eru til, at eyma málið um Kirkjubømúrin aftur er komin fram. Man ikki formaður Tjóðveldisfloksins vilja sleppa sær úr hesum sessin meðan gott er, tí tað kann hugsast at koma honum aftur um brekku, um hann sum formaður floksins skal til at skera ígjøgnum í einum máli, sum liggur mitt í hjartanum á tjóðveldisins háborg. Men kemur annar persónur í henda sess nú, so merkir tað væl, at flokkurin med alla hevur sagt Signar á Brúnni farvæl í landsstýrinum.

Onnur mál, sum vit fara at hoyra meira til komandi dagarnar, er m. a. vegagerðin til Vágatunnilin, sum varð reist í Sosialinum herfyri. Har er neyvan seinasta orð sagt. Eisini eitt annað stórmál er nýtslan av rúsandi evnum so sum hassji og uppaftur sterkari evnum í Føroyum. Men sum rossinan í pylsuendanum so hevur víðgongdi umhvørvismaðurin, Paul Watson, sagt frá, at hann kemur til Føroya í juni. Eisini europameistarakappingin í fótbólti verður í næstum, og tað er so eisini nakað, sum nógvir føroyingar fara at fylgja væl í. Og so verður eisini sett hol á stevnurnar, har tjóðarítrottur okkara, róðurin, verður í fokus. Tí bendir alt á, at vit fáa ein sera hendingarríkan mánað.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Yvirlýsing frá Meinigheitshúsinum í Havn

Vit harmast um blaðskrivingina seinastu tíðina, sum Meinigheitshúsið er drigið uppí.

Øll eru hjartaliga vælkomin til øll tiltøk í Meinigheitshúsinum. - Eingin er útihýstur!

Vit vilja eisini siga frá, at vit ikki vilja fara út í alment blaðkjak. Øll, ið hava spurningar, eru hjartaliga vælkomin at venda sær til stýrið.

**Vinaliga:**
**Stýrið fyri Meinigheitshúsið í Havn**
**Húsagøta 1**
**100 Tórshavn**

# Tritonus konsert í Fuglafjarðar kirkju

*Sunnudagin 4. Juni kl 16:00*



Sunnudagin 4. Juni hevur Tritonus konsert í Fuglafjarðar kirkju undir leiðslu av John Høybye. Hetta er sama konsertin, sum var í Vesturkirkjuni hóskvøldið, sum í Fuglafirði verður sungin við smáum broytingum. Henda konsert varð sera væl fagnað.

Tritonus er í Føroyum í samband við kórstevnuna, har John Høybye er gestakórleiðari og leiðir kórverkið: Sacred Concert av Duke Ellington, sum hann hevur lagt til rættis fyri kór og big band saman við Peder Pedersen.

Ætlanin var at Fuglafjarðar gentukór skuldi frumframføra kórverkið: Allelu-ja hjá John Høybye á hesi konsert, men verður hetta av ongum vegna sjúka. Hóast tað fer kórið at syngja trý løg undir hansara leiðslu og Eivør Pálsdóttir er solistur.

# Piniartut í Klaksvík og Tórshavn



Fólkatónleikarabólkurin „Piniartut“,ið merkir veiðimenninir ella tann ið veiðir, varð settur á stovn á várið ár 2000. Hetta varð gjørt sum liður í einari veiðimentaverkætlan. Stigtakarar eru norðurlandahúsini í Føroyum, Reykjavík og „Nordens Institut i Grönland“.

Tey sum spæla við eru Tellu Virkkala och Ville Kangas, úr Finnlandi, Anda Kuitse úr Grønlandi og Kristian Blak úr Føroyam. Anda Kuitse heimskendur trummudansari úr Tassiilaq, sum liggur í Eysturgrønlandi. Hann hevur m.a. innspælt eina fløgu saman við Kristian Blak, fløgan kallast „Addeq“. Tellu Virkkala, úr Finnlandi, ið júst kemur aftur av konsertfer í Grønlandi, hevur við sær til Føroya finnan Ville Kangas. Bæði arbeiða sum yrkisfólkatónleikarar í Finnlandi og hava gingið á „folkmusikavdelingen á Sibelius-Akademinum“. Hartil er so Kristian Blak sum ídag er ein sera viðurkendur fólkatónleikari bæði í Føroyum og uttanlands.

Fyrstu fer at bólkurin Piniartut er saman, er nú í Føroyum. Komandi vikuskifið fara tey at venja saman í nakrar dagar. Í hesum sambandi vera tvær konsertir. Tann fyrsta verður í Fornminnissavninum í Klaksvík, leygardagin, kl. 17.00 og tann seinna sunnudagin 4. Juni, kl. 16.00 í Norðurlandahúsinum.

Ætlanin er, at Piniartut skal spæla inn eina fløgu komandi heyst. Tónleikurin skal m.a. nýtast til eina ljósmyndarøð, ið snýr seg um veiðimentan í Grønlandi. Tvey íslendskt myndafólk fara at taka myndir av veiðimonnunum í Grønlandi.

Á konsertunum í Føroyum fer bólkurin at nýta uppruna finsk och grønlendsk ljóðføri, sum verða blandaði við ymiskum ljóðeffektum.

Bólkurin fer at spæla bæði nýggjan og gamlan fólkatónleik frá teimum ymsu londunum, sum tónleikarnir umboða.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at pápi okkara

**ÓLAVUR LAMBAA**

andaðist á Landssjúkrahúsinum 30. mai, 72 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum leygardagin kl. 17.00.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju sunnudagin kl. 14.00

**Elin og Ingun**

†

Kunngjørt verður at okkara høgt elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**OSLA JOENSEN,**
Toftir, ættað úr Trongisvági

andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi týsdagin 30.mai, 77 ára gomul.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum, Tórshavn, leygardagin 3. juni kl. 19.00.

Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni sunnudagin kl. 14.

*Familjunnar vegna*
**Edith og Regin**





*Teir tíggju prestarnir: Heri Joensen, Elsa Funding, Jónsvein Bech, Bjarni Bæk, Jákup R. Hansen, Meinhard Bjartalíð, Dávid Johannesen, Emil Olsen, Uni Næs og Jógvan Fríðriksson gera greitt, at teir ikki taka undir við, at »skrásett paralag« verður góðtikið av teimum ella fær rúmd í kirkjum í teirra prestagjaldi. Teir halda tó, at minnilutar, ið víkja frá prestanna fatan, eiga at fáa frið og náðir at liva í tí borgarliga samfelagnum. Øll menniskju hava sama virði. Frávik í átrúnað og siðvenju eru borgarlig rættindi, siga teir*

# Minnilutar hava frið at liva í borgarliga samfelagnum

*Tríggju føroyskir prestar gera greitt, at teir ikki góðtaka ella útinna skrásett paralag ella at kirkjur í teirra prestagjaldi skulu kunna nýtast til slíkt endamál*

Eirikur Lindenskov

Tíggju føroyskir prestar gera nú greitt, at teir ikki góðtaka skásett paralag millum menn ella kvinnur. Teir vísa á, at hjúnalagið millum mann og kvinnu er gudgivið og av Gudi signað.

Teir vísa eisini á, at »skrásett paralag« er rættindi, sum heimilað er í Danmark, men ikki í Føroyum.

Síðani fýra føroyskir prestar noktaðu tveimum donskum bispum at prædika í Vesturkirkjuni í Havn og í Christianskirkjuni í Klaksvík, hevur mikið rok verið innan kirkjuna. Prestar eru beinleiðis skírdir at prædika ranglæru, og herfyri varð noktað sóknarprestinum í Vesturkirkjuni atgongd til ungdómsmøti í Meinigheitshúsinum í Havn.

Heri Joensen hevur kravt umbering fyri hetta, og nú gera hann og níggju aðrir føroyskir prestar støðu sína greiða í hesum máli. Staðfesting teirra er soljóðandi:

Nú vit verða søgd at fara lætt um Guðs heilaga orð og harvið lata dyrnar upp fyri kirkjuligari »markering«/vígslu av skrásettum paralag, er at viðmerkja:

1) Hjúnalagið millum mann og kvinnu er gudgivið og verður av honum signað. Eisini vísir skriftin á møguleikan at liva stakur. Hesir lívshættir eru rættir og sannir.

2) Skrásett paralag eru borgarlgi rættindi t. d. í Danmark. Í Føroyum er ikki lógarheimild fyri skrásettum paralag.

3) »Markering«/vígsla av skrásettum paralag verður høvrki góðtikin ella útint av mær. Ei heldur verða kirkjurnar í prestagjhaldinum, eg varði av, við mínum vilja latnar øðrum til nevndu tænastu.

4) Meti, at minnilutar, ið víkja frá míni egnu fatan, eiga at fáa frið og náðir at liva í tí borgarliga samfelagnum. Øll menniskju hava sama virði. Frávik í átrúnað og siðvenju eru borgarlig rættindi.

5) Í kirkjuna eru øll væl komin at hoyra evangeliið um Guðs fríu frelsu í trúnni á Jesus Krist og fullgjørda verk hansara á Golgata.

6) Ásanni, at eg í trúnni á Jesus Krist livi av náði. Biði lívsins Guð um, at eg sum prestur má vera eitt gott menniskja og vísa Kristi sinnalag. »Tollara og syndarar« eru vælkomnir allar staðir, har eg sjálvur havi nakað at siga.

Skrivað á Gjaranesi hin 30. mai 2000

Heri Joensen
Elsa Funding
Jónsvein Bech
Bjarni Bæk
Jákup R. Hansen
Meinhard Bjartalíð
Dávid Johannesen
Emil Olsen
Uni Næs
Jógvan Fríðriksson

# Løgreglan á herferð eftir rúsevnum

*Sivilklæddir løgreglumenn løgdu tveir mans í hondjørn mitt á gøtunií Klaksvík mikukvøldið. Síðani eru fýra hús rannsakað fyri rúsevni, og tvey fólk eru varðhaldsfongslað í málinum*

Eitt vælmannað løgreglulið úr Havn og Klaksvík var mikudagin og hósdagin á rættiligari herferð eftir rúsevnum í norðoyggjum.

Sivilklæddir løgreglumenn løgdu tveir mans í hondjørn mitt á gøtuni í Klaksvík mikukvøldið, og fýra hús í Klaksvík og Hvannasundi vórðu rannsakað av 10 løgreglumonnum og hundi.

Tvey fólk eru nú varðhaldsfongslað fyri brot á lógina um rúsevni.

Grundlógaravhoyring var fyri afturlætnum hurðum í Føroya Rætti hóskvøldið, og Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini, heldur kortini tætt inn at kroppinum.

**Ein var leyslatin**

Hann vil ikki siga, hvussu stóra mongd av rúsevnum, løgreglan hevur fingið hendur á, og hann vil heldur ikki siga, um talan er um hassj ella onnur rúsevni.

Men fólkini eru skuldsett fyri at hava flutt fýra kilo av hassji inn til Føroya.

Trý fólk vóru grundlógaravhoyrd hóskvøldið, men ein maður varð leyslatin, tí rætturin metti ikki, at nóg góð prógv vóru fyri at varðhaldsfongsla hann. Hann varð skuldsettur fyri harðskap og fyri at hava roynt at flutt LSD inn til Føroya.

Kvinnan var varðhaldsfongslað í tríggjar vikur, harav tvær í isolatión. Og maðurin var varðhaldsfongslaður í tvær vikur. Hann skal sita eina viku í isolatión. ek

